## Teir ringastu bankamenninir



Íslendski handilsmálaráðharrin, Gylfi Magnússon, heldur lítið um teir, sum stóðu á odda fyri teimum íslendsku bankunum undan skrædlinum í fjør. Í samrøðu við bretska blaðið Times sigur hann, at teir íslendsku bankamenninir vóru heilt einfalt teir ringastu í heiminum. Gylfi Magnússon sigur, at eftir seks árum eydnaðist tað oddamonnunum at taka ræðið á bankunum og at trífalda støðd teirra, áðrenn alt rapaði. Íslendski handilsmálaráðharrin sigur, at síðani kreppan byrjaði, hava bankamenn um allan heimin skammað seg, men at eingin teirra kann sammetast við teir íslendsku.

## Endurskoða landamarkið

Noreg og Russland hava mannað eina nevnd, sum skal endurskoða markið landanna millum og koma við uppskoti um broytingar. Markið millum Noreg og Russland er 196 kilometrar langt. Tað bleiv upprunaliga sett í 1826 og bleiv seinast endurskoðað í 1947. Áirnar Pasvikelva og Grense-Jakobselv mynda umleið tveir triðingar av markinum, men av tí at áirnar hava broytt leið, kann tað gerast neyðugt at broyta markið, sigur norski uttanríkisráðharrin, Jonas Gahr Støre, við NTB. Arbeiðið at endurskoða markið byrjar næsta ár.

# Stríðsfundur á Sandi

**Bæði sakførari og grannskoðari verða til staðar á kommunustýrisfundinum á Sandi í kvøld, har Páll á Reynatúgvu fer at gera av, um hann vil halda fram sum borgarstjóri ella ikki**

KOMMUNALPOLITIKKUR

*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Í kvøld avger Páll á Reynatúgvu, um hann heldur fram sum borgarstjóri á Sandi ella ikki. Men áðrenn henda avgerð verður tikin, verður ymiskt annað til viðgerðar.

Fyrst verða fíggjarviðurskiftini hjá kommununi verða løgd fram, síðan kemur Bjørn á Heygum, advokatur, at greiða frá gegninum hjá Pálli á Reynatúgvu í ymiskum málum, ivi hevur verið sáddur um, og eftir hetta, sigur Páll á Reynatúgvu seg kunna siga, um hann fer at halda fram sum borgarstjóri ella ikki.

### Tveir gegnisspurningar

Páll á Reynatúgvu hevur spurt innlendismálaráðið um gegni hjá sær í tveimum ymiskum málum. Seinna málið eru um ógegni í sambandi við løn til borgarstjóra, og har staðfestir ráðið, at alt er farið rætt fram.

Viðvíkjandi hinum spurninginum, sum er soljóðandi:

»Er kommunustýrislimur gegnigur ella ei, tá játtanir til kommunalar stovnar, har teirra avvarandi arbeiða, verða viðgjørdar í kommunustýrinum?«

Er torførari at staðfesta, hvat svarið hjá Innlendismálaráðnum er. Men ein partur av svarinum er soljóðandi:

»Persónur, sum virkar innan almennu fyrisitingina (í hesum føri kommunustýrislimur) ógegningur um so er, at hjúnarfelagin hjá viðkomandi, skyld ella svágd í stígandi ella fallandi linju ella síðulinjuni so nær sum børn hjá systkjum, ella onnur nærskyld hava ein serstakan persónligan ella fíggjarligan áhuga í úrslitinum av málinum ella umboðar onkran, ið hevur ein slíkan áhuga.«

Eftir at millum annað hetta er viðgjørt á fundinum, verður møguliga val av borgarstjóra.

### Nevndarval

Síðan kemur málið á skrá, sum fýra kommunustýrislimir bóðu eykafund um fyri einum mánaði síðan. Nevndarval.

Og at enda verður talan um vanligari mál úr vinnutøkninevndini og trivnaðar- og mentanarnevndini.

So í kvøld verður greitt, um borgarstjórin á Sandi framvegis eitur Páll á Reynatúgvu í morgin.



*Á Sandi hevur verið nógv stríð í kommunustýrinum. Men í kvøld verður ein fundur, sum skal fáa greiðu á nøkrum av stríðsmálunum*

# Borgarstjórin slept eykafundi

**Ongin eyka kommunustýrisfundur var á Sandi hóast biðið var um tað, og kommunustýrislógin tilskilar greitt, at eyka kommunustýrisfundur skal verða, um ein triðingur av kommunustýrinum ynskir tað, so metir Bjørn á Heygum, advokatur, at tað er í lagið at lata vera við at hava fund**

LÓG

*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*



*Bjørn á Heygum, advokatur, heldur ikki, at Páll á Reynatúgvu er farin út um lógarheimildir, tá hann ikki hevði nakran eykafund um nevndarval, sum varð umbiðin fyri mánaði síðan. Men Bjørn á Heygum skal eisini greiða frá um gegni hjá Pálli á Reynatúgvu í kvøld. Millum annað um borgarstjórin var gegnigur, tá hann var við til at seta sína egnu konu í starv*

Í kvøld verður regluligur kommunustýrisfundur á Sandi, men fyri sløkum mánaði síðan bað ein meiriluti í kommunustýrinum um eyka kommunustýrisfund, har nevndarval skuldi vera á skrá. Hesin hevur enn ikki verið, men í á regluliga fundinum er nevndarval á skrá.

Kommunustýrislógin sigur annars soleiðis um eykafundir:

»Kommunustýrið hevur eykafund, tá ið borgarstjórin heldur tað vera neyðugt, ella um 1/3 av kommunustýrislimunum krevja tað. Borgarstjórin ger av, nær og hvar eykafundir verða hildnir.«

Í hesum serstaka føri á Sandi, vóru tað fýra av sjey kommunustýrislimum, sum bóðu um eykafundin.

– Vit vilja hava eyka kommunustýrisfund, helst í hesi vikuni, har val av nevndum verður á skrá, stóð í brævinum, sum hesir fýra kommunustýrislimirnir handaðu borgarstjóranum beint eftir seinasta regluliga kommunustýrisfund 28. septembur.

### Ivi um mál

Sosialurin hevur verið í samband við fleiri advokatar um talan er um brot á kommunustýrislógina ella ikki. Fyrsti advokaturin var vildi ikki úttala seg um málið, tí hann er partur av málum í umhvørvinum. Hinir báðir greiða frá, at tað er líkt til, at okkurt er í, at Páll á Reynatúgvi hevur skúgvað lógina til vikst.

Men Bjørn á Heygum, advokatur, sum eisini skal greiða frá gegninum hjá Pálli á Reynatúgvu á kommunustýrisfundinum í kvøld, tulkar lógina soleiðis, at tað er í lagið, at ongin eykafundur hevur verið, tí nevndarvalið, sum biðið var um, er á skrá í kvøld.

– Einasta kritikkpunktið kundi verið, at tað kanska hevur drigið út at taka málini upp, sigur Bjørn á Heygum.

Hilmar Høgenni, deildarstjóri í Innlendismálaráðnum, vil ikki gera nakra niðurstøðu um hetta mál, men sigur, at tað kundi ljóðað, at mann ikki hevur gingið ynskinum á møti.

– Vit kunnu taka mál upp av okkara eintingum, men eg kann ikki gera nakra endaliga niðurstøðu, tí vit hava ikki viðgjørt málið, leggur Hilmar Høgenni dent á.

### Ivast í kæru

Brandur Sandoy, ein av teimum fýra kommunustýrislimunum, sum bóðu um eykafund, sigur, at teir fýra ivast, um teir skulu lata Innlendismálaráðnum eina klagu um hendan eykafundin, sum ikki bleiv.

– Tað verður fundurin í kvøld, sum avger, hvat vit gera víðari, sigur Brandur Sandoy.